# Felagslívstrygging fyri limir í Føroya Fiskimannafelag

alka

2016



# Føroya Fiskimannafelag

Føroya Fiskimannafelagið (nevnt felagið) hevur gjørt avtalu við Alka um felagslívstrygging fyri limirnar.



**Hvør er fevndur av lívstryggingini?**
Tryggingin er tvungin fyri limir felagsins, um teir eru mynstraðir og ikki fyltir 70 ár.

**Nær og hvussu leingi ert tú fevndur av tryggingini?**
Tú ert fevndur av tryggingini, tá tú mynstrar, og so leingi tú ert mynstraður.

Um tú mynstrar av, ert tú framvegis fevndur av tryggingini í eitt tíðarskeið aftaná.

Tíðarskeiðini eftir seinastu avmynstring eru:

- 30 dagar, um tú hevur verið mynstraður minni enn 30 dagar, ella
- 180 dagar, um tú hevur verið mynstraður í 30 dagar ella meira.

# Tryggingarupphæddir

Skipanin fevnir um hesar upphæddir:

**Galdandi frá 01.01.2016**

| **Skipanin fevnir um** | Upphædd kr. |
| --- | --- |
| Um limur doyr | 500.000 |
| | Upphædd kr. |
| Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr | 250.000 |
| | Upphædd kr. |
| Um limur fær hættisliga sjúku | 83.333 |
| | Upphædd kr. |
| Um barn hjá limi fær hættisliga sjúku | 83.333 |
| | Upphædd kr. |
| Lokalupphædd | 85.000 |

Veitingarnar, burtursæð frá okaupphæddini,verða prístalsreguleraðar hvørt ár pr. 1. januar. Lokaupphæddin verður ásett hvørt ár eftir avtalu millum felagið og Alka.

## Hvat fevnir tryggingin um?

### Útgjald við deyða

Doyr limur, áðrenn hann er 70 ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin.

## Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr

Um hjúnafelagi ella sambúgvi doyr, áðrenn tey eru 70 ár, verður hjúnalagsupphæddin útgoldin. Er talan um sambúgva, er treytin tann, at tit – tvey tey síðstu árini undan deyðanum – hava livað sum hjún á felags bústaði, skrásettur hjá Fólkayvirlitinum.

## Ávísar hættisligar sjúkur

Um limur fær hættisliga sjúku, áðrenn hann er 70 ár, verður veitt útgjald, um ein av niðanfyri nevndu sjúkum verður staðfest:

- Illkynjaða krabbameinssjúku
- Miss av sjónini
- Blóðtøpp í hjartanum
- Miss av hoyrnini
- Hjartaloku skurðviðgerð
- Parkinsons sjúka – Paralysis agitans
- Heilabløðing/slag
- Creutzfeldt-Jacob sjúka
- AIDS (eyðkvæmi)
- Vøddasvinn
- Nýrasvignan
- Meningitis
- Disseminerað sklerosa
- Aorta sjúka
- Ávísir góðkynjaðir vøkstir í heila ella mønu
- Bjølgar á lívæðrum í heilanum
- Flutningur av stórum lívgøgnum (hjarta,
- hjarta/lunga, lunga og livur)
- ALS (amyotrofisk lateralsklerose)
- Ballónvíðkan av kranslívæðrum í hjartanum
- HIV-ígerð (av blóðflutningi ella orsakað av arbeiði)
- By-pass skurðviðgerð (koronarsklerose)

## Nýtt frá 1. januar 2016

Áðrenn nevnda dag var bert møguligt at fáa útgjald eina ferð vegna hættisliga sjúku. Síðani var limurin ikki longur fevndur av hesum partinum av tryggingini og kundi tí ikki longur fáa útgjald vegna nýggja hættisliga sjúku.

Aftaná nevnda dag verður skipanin broytt, soleiðis at møguleiki er at fáa útgjald fleiri ferðir í sambandi við ávísar hættisligar sjúkur, tó soleiðis, at tá útgjald fer fram vegna eina av nevndu sjúkum/viðgerðum, so dekkar tryggingin ikki longur hesar og møguligar atknýttar sjúkur hjá hesum liminum. Fyri at fáa útgjald av nýggjum er harumframt krav um, at ganga skulu í minsta lagi 6 mánaðir frá staðfesting av seinastu sjúkuni, sum er fevnd av tryggingini, til eina nýggja staðfesting av sjúku, sum gevur rætt til útgjald.
Hetta merkir t.d., at limur kann fáa útgjald vegna blóðtøpp í hjartanum og seinni kann fáa útgjald vegna eina av krabbameinssjúkunum, sum eru við í yvirlitinum, tó soleiðis, at ganga skulu 6 mánaðar millum sjúkustaðfestingarnar.

## Barnatrygging í sambandi við hættisligarsjúkur

Tryggingarupphæddin verður goldin út, um so er, at barn, sum er millum 6 mánaðar og 18 ár, hjá limi fær staðfest eina av niðanfyri nevndu hættisligum sjúkum:

- Meningitis
- Illkynjaðar krabbameinssjúkur
- Nýrasvignan
- HIV-ígerð, av blóðflutningi
- AIDS
- Miss av sjónini (barn skal vera 2 ár)
- Miss av hoyrnini (barn skal vera 2 ár)

Tá tryggingarupphædd er útgoldin, so fellur tryggingin av viðkomandi barni burtur.

Hesi børn hjá limum eru fevnd av tryggingini:

- Biologisk børn
- Ættleidd børn
- Fosturbørn, skrásett at búgva á sama
- fólkayvirlitsbústaði sum limurin

## Undantak frá reglunum um hættisligar sjúkur og barnatrygging í sambandi við hættisligar sjúkur.

Um ein limur/barn, áðrenn upptøku í lívstryggingarskipanini,
hevur fingið staðfest hættisliga sjúku, er viðkomandi sjúka og møguligar seinni samsvarandi sjúkur ikki fevndar av tryggingini. Ein áður staðfest sjúka kann eisini merkja, at ein ella fleiri aðrar sjúkur ikki koma undir tryggingina.

## Serregla viðvíkjandi krabbameini:

Um krabbameinssjúka áður hevur verið staðfest, er ein møgulig seinni staðfest krabbameinssjúka ikki fevnd av tryggingini,

Tó er skipanin hon, at um:
- tað áður er staðfest krabbamein og
- útgjald er ikki farið fram vegna hesa sjúku frá bólkalívstryggingini hjá FA og HA og
- tað eru liðin í minsta lagi 7 ár síðani viðgerðin av hesari sjúku er endað uttan nakað afturfall ella krabbasjúkuviðgerð

kann ein nýggj staðfesting av krabbasjúku møguliga vera dekkað av tryggingini.

## Lokaupphædd

Tá tú verður 67, hevur tú rætt til lokaupphædd, um tú hevur verið limur í felagnum seinastu 10 árini.

Limaskapur skal hava verið samanhangandi 5 tey seinastu árini, áðrenn limur fyllir 67 ár.

Um so er, at lokaupphæddin verður útgoldin, so verður hon mótroknað í møguligari seinni útgjalding av tryggingarpeningi í sambandi við deyða.

## Hvør fær tryggingarupphæddina útgoldna?

Um limur ikki hevur sent Alka skjal serliga njótanartilskilan, verður tryggingarupphæddin í samband við deyða útgoldin til næstu avvarðandi.

Hetta merkir, at tryggingarupphæddin verður goldin tí/teimum, ið sita eftir í hesi nevndu raðfylgju:

1. hjúnafelaga/skrásettum partnara, og annars
2. sambúgva, annars
*Treytir:*
*a) Antin at tú og sambúgvi hava felags bústað, og*
*vænta, hava, ella hava átt barn saman.*
*b) Ella at tú og sambúgvi tín hava livað saman sum hjún á felags bústaði 2 tey seinastu árini áðrenn deyðsfallið.*
3. lívsarvingum, annars
*Frágreiðing: Lívsarvingar eru tíni børn, abbabørn og*
*børnini hjá teimum.*
4. sambært testamenti, og annars
5. sambært arvalógini.

Ynskir tú, at tryggingarupphæddin skal útgjaldast til onnur ella skal býtast millum fleiri persónar, skalt tú senda eina njótunartilskilan til Alka. Sí partin: "Serligur njótanartilskilaður".

Tryggingarupphæddin verður útgoldin uttan um búgvið, soleiðis at møguligir kravánarar hjá tí, sum deyður er, ikki kunnu krevja at fáa lut í peninginum.

Um eingir arvingar eru samsvarandi serligum ásetingum um njótanartryggjan, testamenti ella arvalógini, verður eingin útgjalding at fara fram.

Hjúnafelagsupphæddin, tryggingarupphæddin í samband við hættisliga sjúku, trygging hjá børnum í samband við hættisliga sjúku og lokaupphæddin verður útgoldin til limin sjálvan.

### Serlig njótunartilskilan

Ynskir tú at broyta mannagongdina við útgjalding til næstu avvarðandi, kanst tú fáa eitt skjal, sum viðvíkur serligari njótunarskilan. Tá hevur tú møguleika at seta einhvønn, tú ynskir, sum njótunarskilaðar í tryggingini.



Ynskir tú t.d., at sambúgvi tín skal hava útgjaldingina, hóast viðkomandi ikki lýkur treytirnar um útgjalding sambært næstu avvarðandi, skalt tú senda eina njótunartilskilan til Alka.

Vart skal tó gerast við, at sjálvt um tú hevur sett ein serstakan njótunartilskilara, og um tú letur hjúnafelaga og/ella lívsarvingar eftir teg (børn, barnabørn og teirra børn), kunnu hesi mótmæla ásetingini um njótanartilskilan. Hetta merkir, at útgjaldið til tann njótunartilskilaða verður lækkað.

Um tú ynskir at broyta eina áður innsenda njótunartilskilan við rætti at broyta hesa, skalt tú senda nýggja njótunartilskilan inn til Alka.

### Fráboðan og útgjald

Áheitan um útgjald av tryggingarupphæddum skal skjótast gjørligt latast felagnum.

Eitt oyðublað skal fyllast út, har tað stendur, hvørji skjalprógv skulu sendast saman við.

Felagið sendir oyðublaðið til Alka. Tryggingarupphæddin verður sum meginregla goldin um felagið.

### Skattaviðurskifti

Tryggingargjald til tryggingina kann ikki dragast frá í skatti. Eitt útgjald frá tryggingini er frítikið fyri inntøkuskatt og avgjald til tað almenna. Av útgjøldum við deyða skal møguliga gjaldast arvaavgjald sambært føroyska lóg um hetta.

### Kærumøguleikar

Við ósemju um tryggingina ella fráboðaðum skaða, kann kærast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2
1571 København V.

Telefon 0045 33 15 89 00 – millum kl. 10.00 og 13.00.

Við kæru skal serstakt oyðublað fyllast út, og hetta fæst hjá Ankenævnet, Alka, Forbrugerrådet, Føroya Fiskimannafelag ella Forsikringsoplysningen.

### Alment

Krav um lokaupphædd fellur burtur, um hetta ikki er fráboðað Alka áðrenn deyða, ella 6 mánaðir eftir at tú ert farin úr felagnum, ella í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at avtalan millum felagið og Alka møguliga er hildin uppat.

Henda kunning er galdandi frá 1. januar 2015 og er eitt brot av felagslívstryggingaravtaluni og tryggingartreytunum. Nágreiniligu treytirnar eru tær til eina og hvørja tíð galdandi avtalurnar og tryggingartreytirnar.

**Føroya Fiskimannafelag**
Bryggjubakki 14-16.
Postboks 58.
FO-110 Tórshavn
fo-fisk@olivant.fo
fiskimannafelag.fo

gør det enkelt

**Alka Forsikring**
Engelholm Allé 1
2630 Taastrup
Telefon 70 12 14 16
alka@alka.dk
alka.dk